# Norðurøkið vann

## SEV Við 34 atkvøðum fyri og 30 ímóti samtykti eykaðalfundurin hjá SEV at hækka streymprísin við 15 oyrum umframt mvg

Randi Jacobsen / Snorri Brend

Allar kommunurnar í Suðuroynni við undantaki av Hvalba, Sandur, Skopun og Tórshavn atkvøddu ímóti at hækka streymprísin so nógv, sum SEV mælti til, men tær vórðu við undirlutan.

Her er yvirlitið yvir, hvussu kommunurnar atkvøddu.

Talið í klombrum eru atkvøðurnar hjá teirri einstøku kommununi.

randi@sosialurin.fo
snorri@sosialurin.fo




**NEI**

Tórshavn (20)
Vágur (2)
Tvøroyri (2)
Porkeri (1)
Skopun (1)
Sumba (1)
Fámjin (1)
Sandur (1)
Hov (1)
*Íalt: 30 atkvøður*

**JA**

Klaksvík (5)
Runavík (4)
Fuglafjørður (2)
Eysturkommuna (2)
Sunda (2)
Sørvág (2)
Vága (2)
Vestmanna (2)
Nes (2)
Eiði (1)
Fugloy (1)
Húsa (1)
Húsavíkar (1)
Hvalbiar (1)
Hvannasund (1)
Kunoy (1)
Kvívík (1)
Sjóvar kommuna (1)
Skálavík (1)
Skúvoy (1)
*Íalt: 34 atkvøður*




Skeiv lýsing

Av misgáum er skeiv lýsing hjá Smyril Line komin í Sosialin, sum kom út mánadagin 20. desember.

Lýsingin viðvíkjandi ferðaseðlaprísum og ferðaskrá er ein gomul lýsing

**Rætta lýsingin hjá Smyril Line er á síðu 25**

Sosialurin biður um umbering fyri mistakið.

Sosialurin · Postboks 76 · FO-110 Tórshavn

# Spælt í 100 ár í kirkjuni

## Havnar Hornorkestur møtir trúliga upp jóladag at spæla í Havnar kirkju

Randi Jacobsen

Ove Olsen, sum stjórnar Havnar Hornorkestri, veit ikki, hvussu siðurin byrjaði við horntónleiki í Havnar kirkju jóladag.

– Teir hava neyvan verið fleiri enn fýra ella fimm, tí teir sungu uppi í torninum, lótu lúkurnar upp, so jólatónleikurin hoyrdist um allan býin, sigur Ove Olsen.

Í ár eru hundað ár liðin, síðan horntónleikur jørdist fastur táttur undir gudstænastuni jóladag í Havnar kirkju.



*Tey fyrstu árini varð spælt á loftinum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Nú eru spælararnir við fleiri, ofta yvir 20. Uppmøtingin er rímiliga góð. Summir spælarar eru ikki í Havn um jólini, men afturímóti koma fleiri tónleikalesandi heim at halda jól og spæla við orkestrinum jóladag, sigur Ove Olsen.

randi@sosialurin.fo